# Undirvísing í framhaldsdeildini
# við teldu og alnót sum
# arbeiðs- og samskiftisamboð

***Jacob M. Sólbjørg***

Uppgáva til útbúgving sum telduvørður
mai 2004

## Innihaldsyvirlit


Inngangur....3
1.Vavið ....3
Einstaklingaavrik ....4
Bólkaavrik....4
Floksavrik ....4
2. Broytingar/avmarkingar....4
3. Skúlaviðurskifti....5
Flokkurin....5
Arbeiðsumstøður á skúlanum ....5
Skúlans útgerð til kunningartøkni....6
Støðið í kunningartøkni ....6
Fakliga støðið....6
4. Arbeiðsumstøður heima....6
Tólbúnaður heima ....6
Hvønn ritbúnað hava næmingarnir heima ....6
Menning av førleika....7
Arbeiðshættir....7
Skrivlig framseting....7
Teldusamskifti í bólkaarbeiði ....8
Arbeiðslegurnar....8
5. Fígging og útgerð....8
Teldusamskifti....8
Forrit....9
Tekstviðgerð ....9
Adobe Acrobat Reader....9
Adobe Acrobat 6.0 Professional ....9
Onnur forrit ....9
6. Úrslitið ....9
Framtíðin....10
Útgerð....11
7. Skjøl....12

## Inngangur

Henda undirvísingingarroynd er gjørd í einum 9. flokki, sum er rímiliga væl fungerandi og hampuliga væl fyri í kunningartøkni eins og í lærugreinum annars.

Hugskotið til hesa roynd kom, tá ið eg á vári 2002 fekk at vita, at eg skuldi vera flokslærari í einum av 8. flokkunum við Skúlan á Ziskatrøð, Klaksvík, har næmingarnir eru úr Klaksvík og hinum bygdunum í Norðoyggjum.

Upprunaliga skuldi eg undirvísa teimum í lærugreinunum:

- Føroyskt
- Enskt
- Lívfrøði.

Henda samanseting av lærugreinum er væl egnað til undirvísing, har telda og alnót kunnu vera týðandi stuðul til eina vanliga undirvísing Hópur av góðum tilfari er at finna til mál og lívfrøði, og skrivlig avrik eru vælegnað at senda sum teldupostur ella tilfar á ráðstevnum.

Eg fór tí saman við næmingunum undir at royna at nýta kunningartøkni í undirvísingini og í samskiftinum við næmingarnar, meðan teir gingu í 8. flokki.

Vit byrjaðu í smáum við tekstviðgerð t. v. s. skrivaðu ymisk avrik og arbeiddu við teimum inni á teldu. Eisini arbeiddu tey við eitt nú PowerPoint og Excel, tá ið verkætlanin, sum skúlanæmingar skulu gera, kom fyri.

Næmingarnir hava eisini gjørt nógv við at nýta myndir í arbeiðinum, men hvørki video ella ljóð.

Tá ið næmingarnir komu í 9. flokk, fekk ein annar lærari flokkin í lívfrøði, og tí valdi eg at lata uppgávuna einans fevna um evni úr lærugreinunum føroyskt og enskt, men í víðari merking.

Líknandi verkætlanir eru og verða í løtuni framdar, eitt nú $^{e}$XIT á Samsøgades Skole í Århus, har næmingar í 10. flokki hava tilknýti til eitt arbeiðspláss, men eisini fáa undirvísing, ávikavist sum dagar á skúlanum, og fáa undirvísing/loysa uppgávur á netinum.

Næmingar undir hesi skipan hava fyrrapartar tilknýti til eitt virki og arbeiða restina av tíðini heima. Telduútgerðin kemur frá skúlanum, og næmingarnir fáa vegleiðing í nýtsluni av tól- og ritbúnaði, áðrenn skúlagongdin rættiliga fer í gongd.

Skuldi ein slík skipan verið roynd, mátti ein rættiliga stór og tíðarkrevjandi fyrireiking gerast, og tað hevði ligið langt uttanfyri karmarnar um hesa uppgávuna.

Júst í hesum árganginum hevði verið áhugavert at roynt eina víðkaða undirvísing, sum bæði kundi stuðlað vanligu undirvísingini og ikki minst verið hjálp til teir næmingar, sum av onkrari orsøk ikki kunnu fylgja vanligu skúlagongdini, t. d. næmingar, sum eru heima vegna sjúku, liggja veðurfastir, fara av landinum í sjúkraørindum, ella mugu fara av bygdini ella landinum við familju í styttri ella longri tíðarskeið.

Áðrenn ein fer undir eina slíka verkætlan, má ein gera sær greitt:

Hvussu – og í hvønn mun - kann kunningartøkni dragast inn í undirvísingina í einum 9. flokki uttan annars at broyta tær vanligu treytirnar fyri skúlagongdini?

### 1. Vavið

Eg valdi at taka nøkur fá (3) dømi, sum vóru ymisk, bæði sum evni, arbeiðslag og úrslit.

Grundleggjandi skuldu næmingarnir samskifta á FirstClass og fáa uppgávur og vegleiðing ígjøgnum hesa skipan. Allir næmingarnir eru skrásettir sum brúkarar, og teir fingu eina ráðstevnu,

Ziska1995c. Á hesi ráðstevnu fingu teir atgongd til ein kalendara og eitt tjatt-rúm. Á ráðstevnuni fingu teir uppgávur og felagsboð.

Næmingarnir fáa stílar á ráðstevnuni og lata teir til læraran í telduposti.

Webquest er ein annar arbeiðsháttur á nótini, og næmingarnir skulu royna seg við honum, bæði sum flokkur og í smáum bólkum.

Næmingarnir skulu royna at samstarva á nótini, t. v. s. at teir hava on-line samband sínamillum, meðan teir arbeiða við einum evni (antin sita hvør í sínum rúmi á innnót, ella sita hvør á sínum stað við sambandi á alnótini).

**Einstaklingaavrik**

Flestu einstaklingaavrikini vóru stílar. Næmingarnir kundu velja millum tey stílevni, sum lógu í ráðstevnuni. Teir kundu taka tey niður og hyggja nærri at teimum, royna tey, kanska skifta til annað evni. Næmingar, sum ikki eru í skúla hava sama høvi at fáa tilfarið, sum hinir.

**Bólkaavrik**

Størru uppgávurnar vóru skipaðar sum bólkaarbeiði, har næmingarnir fingu høvi til at skipa arbeiðið soleiðis, at uppgávurnar kundu lutast út til undirbólkar ella einstaklingar í bólkinum. Eisini blivu næmingarnir eggjaðir til at taka lut í redigeringini av tilfarinum og velja burturúr. Onkuntíð valdu vit, at sumt av enska og danska tilfarinum rætt og slætt varð sett óbroytt inn í svarið.

**Floksavrik**

Seinna arbeiðslegan í Leirvík hevði sum mál at finna tilfar til trí av evnunum í ensku tekstuppgevingini. Hugsanin var, at bólkar av næmingunum tóku seg saman um at lýsa eitt av evnunum Suðurafrika og Apartheid, Írland og hungursárini og “at liva øðrvísi” – Amish people.

## *2. Broytingar /avmarkingar*

Slíkt virksemi ávirkar altíð skúlagongdina hjá næmingunum, men málið var, at ávirkanin skuldi verða so lítil, sum til bar, og at tann ávirkan, sum hóast alt mátti koma, skuldi hava so nógv gagnligt við sær, at næmingarnir ikki vóru verri fyri, enn hinir næmingarnir á árganginum. Ein treyt var, at næmingarnir ikki skuldu hava ov nógvar uppgávur í sjálvari verkætlanini, og at tann tíðin, sum annars hevði farið til seturskúla, varð nýtt til tær størru uppgávurnar (arbeiðslegur í Leirvík).

Næmingarnir funnu sær sjálvir tað tilfar, teir hildu vera neyðugt til tær størru uppgávurnar, sum høvdu eitt sindur frían form, t. d. søguuppgávan Zivago ella arbeiðslegurnar í Leirvík við Webquests. Her vóru ikki aðrar avmarkingar, enn teir sjálvir settu. Tó skuldi úrslitið setast upp við PowerPoint.

Stílar og onnur skrivlig avrik høvdu meira bundnan form. Her fingu tey uppgávuorðing og tað tilfar, sum hoyrdi til “pappírsuppgávuna” (próvtøkutilfar frá seinastu árunum), men teimum stóð frítt at taka annað tilfar úr skúlabókum, av alnótini ella úr øðrum keldum. Nakrir stílar skuldu skrivast á teldu og latast inn sum viðfesti til teldupost, og summir skuldu skrivast við hond, tí verðandi skúlaskipan krevur hondskrivað avrik og próvtal fyri røkjuskap, er ikki onnur avtala gjørd.

Spurningurin um at sleppa at hava teldu til skrivligu royndina hevur verið frammi, men fyri verkætlanina hevur hetta lítlan týdning, og hetta hevði kravt nógv meir av verkætlanini í skúlaárinum, so hann bleiv lagdur til viks tíðliga, tí eg metti, at serskipan við loyvi at nýta teldu til próvtøkuna lá uttan fyri karmarnar av hesi uppgávu. Næmingarnir fara tí til fráfaringarroynd fólkaskúlans í summar undir somu treytum sum hinir næmingarnir.

Stílarnir vóru skrivaðir við vanligari tíðarfreist, 2 vikur, men størru uppgávurnar skuldu avgreiðast eitt og sama kvøld (einar 5-6 tímar), Zivago tó í 3 dupulttímar í skúlatíð.

## *3. Skúlaviðurskifti*

### Flokkurin

Flokkurin er settur saman av næmingum, sum ikki alla tíðina hava gingið í sama skúla. Meðan næmingarnir úr Klaksvík gingu í 7. flokki, tók skúlin ta avgerð, at flokkurin skuldi býtast í tríggjar flokkar, tí flokkurin var alt ov stórur (29 næmingar). Somuleiðis mæltu skúlarnir á Viðareiði og á Fossanesi til, at teirra næmingar eisini fóru í ymiskar flokkar. Grundirnar eru hesi uppgávu óvikomandi, men hetta hevur sjálvandi hafvt sína ávirkan á flokslæraraarbeiðið, sum eg eisini skuldi røkja hesi bæði árini. Í august 2003 kom ein genta úr Svínoy í flokkin.

Næmingarnir koma sostatt úr fimm bygdum og fýra skúlum.

| | Gentur | Dreingir |
|---|---|---|
| Svínoy | 1 | |
| Norðdepli | 1 | |
| Hvannasundi | 1 | 1 |
| Viðareiði | 1 | 2 |
| Klaksvík | 7 | 5 |

Sosialt hevur flokkurin riggað ógvuliga væl, og tá talan er um arbeiði og samstarv, hava næmingarnir verið ógvuliga ídnir og sjálvstøðugir.

### Arbeiðsumstøður í skúlanum

Skúlin kann bjóða næmingunum hampulig amboð at arbeiða við, men nógvir næmingar eru um tey somu tólini, og tí mátti tann tíðin avmarkast, sum hesin flokkurin var á teldustovuni. Mánadagar hevíði flokkurin møguleika at brúka 4 skúlatímar samanhangandi í telduhølinum. Hesin møguleiki er nýttur, tá okkurt var á skránni, sum tók tíð, eitt nú tá ið okkurt nýtt skal lærast í kunningartøkni.

### Skúlans útgerð til kunningartøkni.

Skúlin hevur tvær teldustovur við ávikavist 16 og 25 teldum, sum næmingarnir sleppa til. Til hesar eru eisini skannarar og prentarar til lit og svart/hvítt. Afturat hesum eru myndatól og diktafonir, so umstøðurnar eru hampuligar, tá tíð er avsett til slíkt arbeiði.

Skúlin hevði ikki fast samband við alnótina, tá fyrireikingarnar til hesa verkætlan byrjaðu (Zhivago), men meginpartin av tíðini hevur skúlin havt fast samband.

Skúlin hevur eina heimasíðu, men í sambandi við hesa uppgávuna valdi eg heldur at gera eina ráðstevnu í FirstClass-skipanini, sum lærararnir í flokkinum og vegleiðarin til uppgávuna eisini høvdu atgongd til.

**Støðið í kunningartøkni.**

Næmingarnir úr bygdunum vóru vanir við at nýta teldu og teldupost í skúlanum og dugdu sum heild betur at arbeiða við FirstClass skipanini, men annars var ikki so stórur munur á førleikanum. Allir næmingarnir dugdu at nýta tekstviðgerð og at seta myndir inn í tekstir. Rokniark og PowerPoint vóru teir meira ókunnigir við men teir fingu nakað av frálæru í hesum forritum.

**Fakliga støðið**
Næmingarnir í flokkinum vóru sum heild væl fyri í máli og dugdu betur enn vanligt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva. Í øðrum lærugreinum var støðið, sum vanligt er í øðrum flokkum, og munurin á næmingum var á leið tað, sum vanligt er í 8. og 9. flokki

## *4. Arbeiðsumstøður heima.*

Næmingarnir blivu spurdir framman undan, hvussu til stóð við teldum heima. Øll søgdu seg hava atgongd til teldu og samband við alnótina heima. Seinni vísti tað seg, at útgerðin ikki virkaði eins væl hjá øllum. Men øll sluppu at skriva sær tað neyðuga út á skúlanum, eins og tey sluppu at lesa post og senda uppgávurnar til læraran, hetta darvaði uppgávuni á tann hátt, at alt tók longri tíð at avgreiða, men darvaði annars ikki góðskuni. Næmingarnir fingu sum heild avgreitt sínar uppgávur á tann hátt, teir høvdu sett sær fyri.

**Tólbúnaður heima**

Næmingarnir høvdu næstan allir teldu við Windows 98 ella XP við prentara heima (tveir næmingar høvdu Windows 95, og tveir høvdu ikki prentara, ella hann var í ólagi). Allir næmingar høvdu samband við alnótina, men ikki øll fingu tað at virka nóg væl. Tí máttu fleiri hava atgongd til aðrar teldur, tá uppgávur skuldu latast inn, ella tá uppgávutilfar skuldi takast niður. Oftast gjørdu tey hetta á skúlans teldum, men tey brúktu eisini  teldur hjá skyldfólki og vinum/skúlafeløgum. Øll kundu rættiliga frítt brúka telduna til tað, tey skuldu gera, men onkuntíð máttu tey bíða, til onnur vóru liðug við sítt. Heima brúka tey ikki alnótina ofta, men tey flestu brúka alnótina til at skaffa sær upplýsingar. Mest sum øll brúka telduna til heimaarbeiði, og tá mest í føroyskum, men nøkur eisini í hinum mállærugreinunum. Mest nýtta forrit er tekstviðgerðin

Nakrar gentur halda, at teldurnar og teldusambandið á skúlanum eru brúkilig, men flestu dreingirnir eru ónøgdir við bæði.

Sum heild halda tey, at lærararnir duga ov illa í teld, hóast tey halda onkrar duga eitt sindur.

Bert ein hevur ikki egna fartelefon.

**Hvønn ritbúnað hava næmingarnir heima.**

Flestu næmingarnir skriva við Word, men annars fingu allir næmingarnir høvi at leggja forrit av forritafløguni hjá KT-deplinum inn á teldurnar heima.

Teir fingu boð um at leggja hesi forrit inn:

- FirstClass

- Acrobat Reader

- WinZip

- Open Office (ensk útgáva), um heimateldan ikki hevði aðra nøktandi tekstviðgerð.

Eitt sindur av stríði var at fáa alt at rigga, serliga uppsetingin av FirstClass, men nú leið móti endanum, riggaði alt sum tað skuldi.

**Menning av førleika.**

Tá næmingarnir skuldu arbeiða við verkætlan í 8. og 9. flokki, fingu teir eina lættari kunning um tey forrit, sum máttu metast at kunna brúkast til arbeiðið við verkætlanini ella til framløgu av úrslitinum PowerPoint og Publisher. Eisini vórðu næmingarnir gjørdir varugir við onnur leitingarforrit enn Google, eitt nú AltaVista og Mamma. Flestu næmingar brúktu bara Google. Til krevjandi uppgávur fingu næmingarnir beinleiðis hjálp t. d. til Paint Shop Pro ella Photo Draw (skera myndir út ella seta myndir saman). Í Webquestini Zhivago og Verkætlanaruppgávuni var fínt høvi at lærar seg at nýta forritini.

**Arbeiðshættir**

Næmingarnir fingu rættiliga rúmar ræsur til at arbeiða. Summir vildu sleppa í gongd á skúlanum, serliga við teimum uppgávunum, sum høvdu dám av felagsarbeiði, men tað kom meira enn so fyri, at onkrir næmingar tóku seg saman og fóru heim at arbeiða. Sum áður nevnt skuldu næmingarnir onkuntíð senda avrikið sum viðfesti til teldupost, og onkuntíð var kravið, at avrikið skuldi vera skrivað við hond. men oftast kundu næmingarnir frítt velja, hvussu teir greiddu uppgávuna úr hondum.

**Skrivlig framseting**

Uppgávurnar í skrivligari framseting eru tiknir úr próvtøkustílum seinastu árini. Væl ber til at skanna teir til PDF-fílur við Acrobat Reader, men ikki ber til í hesum forriti at gera fílu við fleiri síðum, og tí eru fyrstu stílevnini løgd út sum fleiri fílur, um tey fyltu meri enn eina síðu.. Acrobat Professional er nógv betur hóskandi amboð, tí her ber til at leggja fleiri síður inn í somu fílu. Tískil ber til at leggja eitt heilt hefti út í einari fílu til næmingarnar at nýta ella at leggja hvørt stílevni út sum eina fílu. Ikki alt tilfar, sum er viðgjørt á teldu, er lagt í ráðstevnuna. Sumt er einans á servara skúlans, har flokkurin hevur eitt øki fyri seg, og næmingarnir eisini hava sítt øki. Dømi um hetta er viðgerðin av bókini Sundur og saman og Zhivago. Seinni í hesi uppgávu verður nomið við onnur uppgávusløg, sum eru væl egnað til slíka undirvísing.

Størru uppgávurna hava næmingarnir fingið beinleiðis, ella tær eru lagdar í ráðstevnuna, stundum sum slóðir

**Teldusamskifti í bólkaarbeiði.**

Ætlanin var at royna at sita í arbeiðsbólki við samskifti sínamillum í á netinum. Royndin skuldi fevna um tveir dagar: Fyrra dagin skuldu næmingarnir sita á somu teldustovun, men alt samskifti skuldi fara í samskiftisskipan t. d. Microsoft Messenger. Seinna dagin skuldu vit so royna teldusamskifti, har næmingarnir sita hvør í sínum lagi – heima ella á hvør sínari teldustovu.

Onki kom tó burtur úr royndunum, tí tann dagin, vit høvdu sett av til hetta endamál, fingu vit ikki Messenger-skipanina at rigga. Vit fingu so tey ráð, heldur at nýta Yahoo, tí hon er einfaldari, men tá var tíðin farin at ganga undan, og hesin parturin er fyribils sleptur. Kanska kann hann takast upp aftur, tá ið skrivligu próvtøkurnar eru fingnar frá hondini, men óvist er, um stundir verða at fáa royndina við í hesa uppgávuna.

**Arbeiðslegurnar**

Fyrra arbeiðslegan var í Leirvík 19. oktober 2003. Leirvíkar skúli hevur eina nýggja teldustovu, sum er serstakliga væl egnað til næmingar, sum arbeiða í bólki.

Uppgávan var at skipa fyri eini ferð úr Føroyum til Keypmannahavnar. Hvør bólkur skuldi gera eina kostnaðarætlan og finna ferðamøguleikar, gisting og nøkur støð at vitja, skipa fyri eini útferð til Helsingør og finna 1 stað at vitja har. Úrslitið skuldi sendast læraranum sum teldupostur. Eitt dømi er á skjali 1.

Seinna arbeiðslegan var 1. apríl 2004. Hesa ferð var uppgávan at fáa nakað at vita um tíðina og umstøðurnar, sum tær koma til sjóndar í trimum av tekstunum í ensku tekstbókini. Síðani skuldu næmingarnir finna upp á ein persón, seta hann í hesar umstøður, og skriva ein tekst um, hvussu umstøðurnar og tíðin ávirkaðu henda persón.

## *5. Fígging og útgerð*

Eingin peningur er settur av til verkætlanina, men skúlin játtaði at gjalda kostnaðin av nýtsluni á teldustovuni í Leirvíkar Skúla, eins og forritið Acrobat Professional er keypt til Felagsteldustovuna á Ziskatrøð/Skúlanum við Ósánna. Skúlin lat eisini pening fyri ferðina til Leirvíkar og aftur. Matur og gisting verður vanliga goldið av næmingunum sjálvum, tá ið næmingar skúlans fara av bygdini at gista, men helst man tað vera, tí at skipað seturskúlavirksemi ikki hevur verið ein fastur táttur av skúlagongdini.

**Teldusamskifti**

Fyrst og fremst hava vit nýtt teldupostforritið FirstClass. Her hava vit havt eina ráðstevnu, Ziska1995c, til at leggja uppgávur og almenn boð í. Allir lærarar flokksins hava havt atgongd til stevnuna, men hinir hava ikki nýtt hana. Tó hevur lærarin í rokning/støddfrøði nýtt ráðstevnuna til at geva boð.

Í ráðstevnuni er eisini ein kalendari, men hann hava vit ikki nýtt stórvegis.

Næmingarnir hava eisini havt eitt tjattrúm, og tað var nógv brúkt í fyrstuni, men áhugin dalaði, serliga tí ikki bar til at avmarka talið av luttakarum. Onnur forrit til samskifti í einum avmarkaðum bólki kundu verið Yahoo! ella Messenger, men vit hava sum áður nevnt ikki nýtt hesi forrit, tí tíðin gekk undan.

**Forrit**

Næmingarnir hava í stóran mun nýtt tey forrit, sum heimateldan hevur, men teir fingu høvi til at leggja forrit inn av fløgu frá KT-deplinum. Á skúlunum hava teir sjálvandi nýtt tað, sum skúlin kundi bjóða og tørvur var á.

**Tekstviðgerð**

Flestu næmingar hava nýtt tekstviðgerðina Word 2002. Hesa kenna teir eisini frá skúlanum. Heima hava teir helst havt eldri útgávur. Onkur hevur nýtt Open Office.

**Adobe Acrobat Reader**

Vit hava nýtt hetta forrit til at gera fílur at leggja í ráðstevnuna, og hetta hevur borið væl til. Flestu næmingar hava nýtt høvið til at skriva sær tilfarið út á skúlanum, serliga eftir at skúlin fekk fast samband, sum er væl skjótari, um fleiri brúkarar eru á samstundis. Forritið er ókeypis, men hevur sínar avmarkingar. Ikki ber til at leggja fleiri síður inn á somu fílu, so tvær síður til somu uppgávu máttu merkjast t. d. sum a og b.

**Adobe Acrobat 6.0 Professional**

Hetta forritið er nógv betur egnað til hesa undirvísing. Her ber til at gera PDF-fílur við fleiri síðum, at gera felt, har brúkarin kann skriva svar og at geva leiðbeiningar, sum koma fram, tá tú peikar á feltið. Eg kenni ikki forritið nóg væl, men helst ber til at validera feltið, so brúkarin beinan vegin kann síggja, um beint er svarað. Acrobat Reader kann skriva í hesi feltini, men ikki ber til at skriva úrslitið út ella senda tað. Acrobat Standard kann skriva ella senda svarið, men tann útgávan er ikki ókeypis.

**Onnur Forrit**

Onkrir næmingar hava nýtt onnur forrit, serliga til myndir (forsíðiur o. t.). Eg vil mæla til, at avtalað verður hvørji forrit næmingarnir fara at nýta, tí tað kann vera torført at vegleiða næmingunum í arbeiðinum, um lærarin ikki kennir forritið, og møguleikarnir at rætta/broyta avrikið eru avmarkaðir, hevur skúlin ikki forritið liggjandi. Í fleiri førum ber til at nýta tíðaravmarkaðar Demo-útgávur til hetta endamál.

## *6. Úrslitið*

Næmingarnir hava lært at nýta teldu og alnót í samskifti og til at søkja sær kunnleika. Teir hava eisini lært at fáa til vega myndir og grafiskar framsetingar at stuðla tilfarinum. Saman og saman við læraranum hava teir funnið sær loysnir á óteljandi størri og smærri trupulleikum. Alt hetta má metast at koma teimum til gagns seinni.

Teir hava eisini lært at leita eftir tilfari á alnótini og at viðgera tað. Teir lærdu eisini meta um tilfarið og at geva sær stundir at týða teð.

Nú henda tilgongd er komin at enda, eru næmingarnir (18) spurdir um hana.

9 næmingum dámdi væl at skriva stíl, og 8 svaraðu toluliga.

Fyrru verkætlanina dámdi 6 næmingum væl og 10 dámdi hana toluliga. 2 næmingum dámdi hana illa.

Seinnu verkætlanina dámdi 3 næmingum væl, 10 toluliga, og 5 næmingum dámdi hana illa.

11 næmingar kundu hugsað sær at hildi fram á somu leið næsta ár, men 7 svaraðu nei.

Nakrir næmingar komu við uppskoti til lærugreinir, teir kundu hugsa sær at arbeitt við á teldu og alnót. Uppskotini vóru:

| | |
|---|---|
| føroyskt | 5 næmingar |
| danskt | 3 næmingar |
| enskt | 2 næmingar |
| landalæru | 1 næmingur |
| kristni | 1 næmingur |

Tríggir næmingar hildu, at hetta arbeiðið fór við ov nógvari tíð, og at tað serliga fór illa við undirvísingini í enskum. Eg má geva hesum næmingum rætt. Arbeiðið tók nakað nógva tíð frá lærugreinunum, men skuldu vit royna eitt hanpuliga fjølbroytt arbeiðslag og nøkur ymisk evni, so máttu vit taka ta tíð, sum skuldi til. Nú veit eg, at hetta ber til, so nú er ikki neyðugt at arbeiða við øðrum uppgávum enn teimum, sum eru náttúrligur partur av lærugreinunum.

Stílarnir riggaðu best. Fleiri næmingar gjørdu meir burtur úr svarinum, nú møguleikar vóru til tað. Tær stóru uppgávurnar vóru í størra lagi til ta tíð, vit kundu seta av, so vit máttu linka krøvini til framløgu av tilfarinum. Hóast tað, so gjørdu onkur eitt sindur burturúr. (sí skjøl).

Eg havi sjálvur fingið væl burtur´úr arbeiðinum við hesi uppgávuni, sum kann nýtast í arbeiðinum við øðrum flokkum. At læra seg arbeiðslagið tekur tíð, men hava næmingarnir lært seg at arbeiða soleiðis, kunnu teir fáa væl meir burtur úr síni skúlagongd, og teir kunnu lættari ogna sær tíðarhóskandi vitan um eina rúgvu av evnum.

Sama um tikið ber til at siga, at sjálvt arbeiðið gekk væl, tá ið næmingarnir fingu tíð til at seta seg inn í uppgávuna og leggja sær eina ætlan, meðan tað var meira misjavnt, hvat ið kom burturúr, tá ið tey ikki fingu tíð at leggja sær arbeiðið til rættis. Einstakir næmingar dugdu tó væl at arbeiða og leggja sær til rættis á leiðini, serliga um teir vóru einsmallir um uppgávuna.

## Framtíðin

Áhugavert hevði verið at hildið fram við flokkinum í 10. flokki, men hetta tykist ikki fara at henda. Men flokkurin kundi saktans hildið fram á somu leið við einum ella helst fleiri av sínum lærarum.

Komandi ár hava allir 8. flokkarnir eins tímatalvu í høvuðslærugreinunum, og tá verður vantandi roynt at hava eina líknandi skipan frá byrjan av, og so kanska byggja omaná, sum nú menningin í kunningartøkni verður, bæði hjá næmingunum og á skúlanum.

Nøkur evni:

- stílar
- uppgávur til málviðgerð
- fyrireiking til framløgur í einstøku lærugreinunum, t. d. søgu, landalæru ella lívfrøði
- innsetingarfyrisøgn við ljóðfílum
- skrivligar royndir av ymsum slag
- ljóðfílur til málundirvísing/serundirvísing

Tað tilfar av fjølritaðum slag, næmingarnir fáa í skúlanum, kann lættliga kann leggjast í eina ráðstevnu, tí nýggjastu fjølritingartólini hava ljóslesara og kunnu goyma tilfarið sum PDF-fílur á innnótini, og lærarin hevur sjálvur upprunarættindini til tað tilfar, hann sjálvur hevur skrivað.

Arbeiðið við regluligari nýtslu av ráðstevnu gevur eisini læraranum møguleikar at geva næmingum boð og tilfar, hóast flokkurin ikki er í skúla, og næmingar, sum eru burturi frá flokkinum í styttri ella longri tíðarskeið, kunnu fáa sama tilfar, sum hinir, og missa tí ikki sambandið við flokkin.

Men størsti vinningurin man tó vera, at næmingarnir læra seg at nýta teir møguleikar, henda tøknin gevur teimum, áðrenn teir fara at útbúgva seg víðari ella fara út í vinnulívið.

**Útgerð**

Til slíka undirvísing hoyrir eisini útgerð. Á skúlastovuni eigur at vera:

- Fartelda/telda
- Hátalari
- Kanón
- Samband við alnótina

Lærarin má hava fyrireikingarmøguleikar við øllum teimum neyðugu amboðunum og tólunum, so sum

- teldu við hátalara/høvdalurti og mikrofon
- samband við alnótina
- ljóslesara
- prentara
- øll tey neyðugu forritini

Helst skal hann hava somu møguleikar heima, og helst hava eina farteldu.

Hesir møguleikar kunnu lættliga seta krøv til læraran, sum fara langt út um ta arbeiðstíð, sum sáttmálin ásetur, og tí má eyka tíð setast av.

*7. Skjøl*

# Hár-móti



## • Greið frá tíni hugsan um móta, bæði hár- og klædnamóta

Tá id tey ungu skulu vísa teirra tankar og kenslur nýta tey ofta hárið og klæðini sum úttrikk fyri sínum idintiteti. Ungdómurin hevur altíð nógv upp á hjárta, og sæst tað aftur í mátanum sum tey klaða seg í og seta hárið.
Tey ungu í dag tora at gera nógv meira vid hársniði enn fyrr. Í dag tora umleið 70% av gentunum nærum alt vid hársniði, meðan 15% av dreinginum tora at gera nakað við hárið hjá sær.

## • Hví heldur so tú, at tey ungu hugsa nógv um hár móta?

Hárið er tann partur á høvdinum, sum er lættast at broyta. Tí er tað oftast hárið, sum gevur  ungdóminum møðuleika at skifta stíl og fylgja við mótanum. Ungdómurin fylgir sera væl við, hvat ið hendir í mótaverðini í dag. Vit kunnu jú keypa alskins bløð í handlunum og síggja tey nýggjastu sniðini á MTV og í filmum – og ikki minst internetið.

## • Heldur tú, at munur er á hármóta og klædnamóta ella fylgjast teir?



Mín hugsan er tann, at hár- og klædna-móti er nakað sum er skiftandi, og kemur aftur. Tá ið 'beatla-hársniðið' var frammi, vóru eisini trompetbúksurnar frammi. Nú, fyri umleið 5 árum síðani, vóru trompetbuksunar frammi aftur. Tað, sum vit í dag grína at, ferð kanska vera móti um 10 ár - Hvør veit?

| | Drongur | 8 | Genta | 10 |
|---|---|---|---|---|

## Undirvísing við teldusamskifti

| | Ja D | Ja G | Nei D | Nei G |
|---|---|---|---|---|
| 1. Hevur tú teldu heima? | 8 | 10 | 0 | 0 |
| 2. Hvørja stýriskipan hevur hon? | | | | |
| Windows 95 | 1 | 1 | | |
| Windows 98 | 3 | 6 | | |
| Windows 2000 | | 2 | | |
| Windows XP | 6 | 1 | | |
| Aðra skipan | 0 | 0 | | |
| 3. Hevur teldan hátalarar/høvdalurt? | 6 | 9 | 2 | 10 |
| 4. Hevur teldan mikrofon? | 3 | 3 | 5 | 7 |
| 5. Hevur teldan prentara? | 7 | 9 | 1 | 1 |

| 6. Hvat dámdi tær arbeiðið? | Væl D | Væl G | Toluliga D | Toluliga G | Illa D | Illa G |
|---|---|---|---|---|---|---|
| At skriva stíl? | 3 | 6 | 4 | 4 | 1 | |
| At skipa fyri ferð til Danmarkar? | 4 | 2 | | 6 | 4 | 2 |
| At skriva um ein persón/evni? | 2 | 1 | 3 | 7 | 3 | 2 |

| | Ja D | Ja G | Nei D | Nei G |
|---|---|---|---|---|
| 7. Kundi tú hugsað tær at hildi fram soleiðis næsta ár? | 7 | 4 | 1 | 6 |

| 8. Um ja, so í hvørjum lærugreinum? | Ja D | Ja G | Nei D | Nei G |
|---|---|---|---|---|
| Føroyskt | 5 | | | |
| Danskt | 3 | | | |
| Enskt | 2 | | | 3 |
| Landalæra | 1 | | | |
| Kristni | 1 | | | |